# Endiliga kom Tr

**Í gjár var dagurin, tá Tróndur í Gøtu loksins kom til Føroya. Koman hjá skipinum er útsett fleiri ferðir, men nú liggur skipið í rættari havn. Kostnaðurin á skipinum bleiv 20 milliónir krónur meira enn ætlað**

SKIP

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*




*Tróndur í Gøtu skal hava heimahavn í Runavík, og fleiri hundrað fólk tóku ímóti skipinum, tá tað kom á fyrsta sinni*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

27. februar var ætlanin, at nýggi Tróndur í Gøtu skuldi koma til Føroya, men hetta varð av ongum, tí skipið bakkaði inn í grótkastið í Skagen, har skipið er bygt.

Men í gjár kom skipið endiliga til Føroya, har tað fyrst fór ein túr inn á Gøtu, áðrenn skipið var siglt til Runavíkar, har tað skal hava sína havn.

Klokkan 17 var skipað fyri móttøku fyri skipinum í Runavík, og fleiri hundrað fólk vóru komin at taka ímóti nýggja Tróndi í Gøtu.

Borgarstjórin í Eystur kommunu, Jóhan Christiansen, helt røðu og tað gjørdu ymisk onnur eisini, áðrenn Jákup Jacobsen, reiðari, segði nøkur orð.

– Hetta er ein avbera stórur dagur fyri okkum, hóast vit hava upplivað líknandi dagar, segði Jákup Jacobsen, áðrenn hann boðaði frá, at øll vóru vælkomin at hyggja at skipinum, tá tey ymisku vóru liðug at bera fram røður.

Hann greiddi somuleiðis frá, hvørja ávirkan eitt skip sum Tróndur í Gøtu hevur á nærumhvørvið, og hvussu reiðaríið seinastu 25 árini hevur ment seg – bæði í truplum og góðum tíðum.

## Grótkast um skrúvuna

Men tað tók sína tíð at fáa skipið til Føroyar. 6. februar varð skipið doypt í Skagen, og tá var longu greitt, at skipið var seinkað av nógva kavanum, sum hevur verið í Danmark í vetur, sum hevði við sær, at smyrjiarbeiðið nærum ikki bar til meginpartin av vetrinum.

Eftir dópin var tó ætlanin, at skipið skuldi vera í Føroyum 27. februar, men hetta gekk heldur ikki.

Orsøkin var, at 26. februar vóru teir úti og royndu útgerðina hjá skipinum. Ikki heilt alt gekk eftir vild, og tá teir komu í havn bleiv



*Tað tók sína tíð at fáa landgangin á føroyskan kajkant á fyrsta sinni, men tað hendi beint eftir klokkan 17 í gjár*
*Mynd: Eirikur í Jákupsstovu*

púra galið. Skipið skuldi leggja at, og áðrenn teir vardu tað virkaði skrúvan á skipinum sum ein grótknúsari í grótkastinum í Skagen.

Tað var beinanvegin greitt frá, at orsøkin helst var, at menninir ikki reiðiliga kendu skipið.

Síðan komu boðini, at skrúvubløðini skuldu umvælast, og at hetta skuldi taka nøkulunda eina viku.

Hetta eydnaðist heldur ikki.

– Nú bleiv tað eitt sindur drúgt ímóti endanum. Arbeiði tók tríggjar vikur, og helvtin av tíðini er farin í formalitetir. Tað kundi tikið helvtina styttri tíð, men nú bleiv tað soleiðis, greiðir Dávið Jacobsen, tekniskur leiðari hjá Varðanum frá.

## Kvarta milliard

Ætlanin var upprunaliga, at hetta køliskipið, sum Varðin í Gøtu hevur latið bygt, skuldi kosta 230 milliónir krónur, men orsaka av teimum trupulleikum, sum hava verið, er kostnaðurin komin upp á kvarta milliard krónur.

Men hetta er eisini orsakað av, at broytingar vórðu gjørdar á skipið, áðrenn skipið varð yvirtikið.

Sambært Jákupi Jacobsen, reiðara, er ætlanin, at skipið skal veiða fyri 70